# Nýggj summarsending í Útvarpinum

Í morgin byrjar nýggj summarsending í Útvarpinum. Sendingin fær navnið Radius, sum eisini var nýtt seinasta ár. Tað eru tey fýra Kári Sólstein, Elin í Stórustovu, Finnur Jensen og Fróði Løkságarð sum koma at standa fyri sendingini. Vit fyrstu ferð verður send týsdagin 3. juni.



# Avgjald á fisk



*Eins og flogfeløg leggja oljuavgjald omaná prísin á ferðaseðlum, er kanska ein gongd leið at leggja oljuavgjald omaná hvørt kilo av fiski, sum selt verður*

**Eins og í Føroyum og øðrum londum uttan um okkum, sum reka fiskivinnu, er fiskiflotin í Danmark í eini sváriari orkukreppu. Nú verður skotið upp at leggja oljuavgjald á fisk fyri at kompensera øktu oljuútreiðslurnar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Støðugt veksandi prísirnir á olju hava rakt fiskiskipaflotan sera meint. Meðan oljuprísirnir eru nógv øktir, er fiskaprísurin um somu tíð lækkaður. Tí stúrir Danmarks Fiskeriforening nú av álvara fyri fiskiskiparakstrinum.

- Støðan hjá donsku fiskivinnuni er líka so álvarsom, sum í suðurevropeisku londunum, har vit hava hoyrt um ymisk tiltøk seinastu tíðina.

Tað sigur formaðurin í Danmarks Fiskeriforening, Flemming Kristensen.

Danskir politikarar verða eggjaðir til at veita fiskiskipavinnuni eina hjálpandi hond í truplu støðuni.

- Franska stjórnin veitir 2,35 krónur í stuðli fyri hvønn litur av olju, sum skipini brúka. Hetta avlagar kappingina í fiskiskipavinnuni millum ymsu londini, eitt nú tá donsk, fronsk og týsk skip landa upsa í Danmark, sigur Flemming Kristensen.

## Oljuavgjald

Hann heldur, at um londini ikki skulu út at kappast við ríkisstuðli aftanfyri seg, verður neyðugt at finna eina varandi loysn á orkutrupulleikunum.

Dansk Fiskeriforening hevur tvey boð upp á, hvussu byrgjast kann uppfyri ringastu avleiðingunum.

- Minstiprísirnir á fiski, sum ES hevur ásett, skulu haldast. Hetta hevði trýst marknaðarprísirnar uppeftir.

Í aðrar mátar skýtir felagið hjá donsku fiskiskipavinnuni upp at áleggja fiskakeyparum eitt oljuavgjald á fisk – á sama hátt, sum flogfeløg leggja oljuavgjald oman á ferðaseðlaprísir.



*Flemming Kristensen, formaður í Danmarks Fiskeriforening*

umhvørvisstovan

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Umhvørvisstovan tann 29. mai 2008, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, nr. 4 og 4a, seinni broytt í grein 5, nr. 1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, hevur góðkent:

**Jarnmóttøkuplássið hjá Tórshavnar kommunu á Sandvíkarhjalla**

Góðkenningin liggur alment frammi á Umhvørvisstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, FO-165 Argir, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, www.us.fo.

**Umhvørvisstovan**



*Hjá ávísum skipabólkum er ikki nóg mikið longur, at fiskiskapurin er góður. Tað hongur ikki saman kortini, nú oljan er vorðin so dýr*
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Formaðurin í Reiðarafelagnum, Viberg Sørensen, noyðist nú at ásanna, at fiskiskipaflotin er í størstu kreppu nakrantíð*
Mynd: Vilmund Jacobsen

í longri tíð hevur helmingurin av okkara djúpvatnsflota ligið, og herfyri løgdu øll svartkjaftaskipini samstundis, tí fiskiskapurin loysti seg ikki, nú oljan er vorðin so dýr, samstundis sum prísirnir á ídnaðarfiski vóru so lágir.

Fleiri nótaskip eru nú á sild, hóast sildin enn ikki er hin besta til dygdar eftir gýtingí vár. Ein partur av norðhavssildini verður soleiðis veiddur, sum kanska skuldi verið goymdur, til sildin er betri.

## Eingin stuðul

Í grein í Sosialinum herfyri søgdu bæði løgmaður, Jóannes Eidesgaard og fiskimálaráðharrin, Tórbjørn Jacobsen, at eingin oljustuðul fer at verða latin skipunum, hóast oljan er við at leggja alla trolvinnuna lamna.

Sum skiltist á teimum báðum, kemur slett ikki upp á tal at veita fiskiskipavinnuni ein lætta í oljuni, nú oljuútreiðslurnar hjá summum skipabólkum telja uppí 2/3 av veiðivirðinum á túrum, sum annars eydnast hampiliga væl.

Løgmaður helt í greinini enntá fyri, at einki er so ringt, at tað ikki kann vera gott fyri okkurt.

Í hesum sambandi vísti hann á, at høgu oljuprísirnir kanska fara at fremja eina tillaging í okkara fiskiskipaflota.

## Okey at "taka"

Tað er ikki bara hjá fiskiskipavinnuni, at oljan kostar tað hvíta út úr eygunum. Tað ger hon so sanniliga eisini hjá familjunum kring um landið, sum rinda ein alsamt størri part av nettoinntøkuni til olju fyri at hava hita og heitt vatn í húsunum.

Ein partur av høga oljuprísunum, sum húsarhaldini rinda, er oljuavgjald, sum landskassin tekur.

Men her er eftir øllum at døma eingin trupulleiki hjá Jóannesi og Tórbirni at taka oljuavgjald frá barnafamiljum, pensjónistum og øðrum omaná methøga oljuprísin.

Báðir siga teir, at fiskiflotin noyðist at tillaga seg broyttu umstøðurnar, men teir siga – sjálvandi - einki um, at landskassin eisini noyðist at tillaga seg – uttan oljuavgjald.

Tað er í lagi at taka, men bæði løgmaður og fiskimálaráðharrin eru fullsamdir um, at einki ískoyti skal veitast fiskiskipavinnuni, ið er grundarlagið undir okkara búskapi.